# BÝRÁÐSFUNDUR

# Vágs Býráð

**Dagfesting:** 28.08.2017 kl. 19:00
**Málnr.:** 17/00001

Nevndarlimir:: Dennis Holm
Eydis Kjærbo
Kirstin Strøm Bech
Levi Mørk
Anna Brattaberg Samuelsen
Eyðbritt Krosslá
Dánjal Bjarkhamar
Conrad Gaard Joensen

Vara limir: Jens Sivar Djurhuus

Ikki møtt: Erhard Joensen, fráboðað

Nevndarskrivari: Petry Joensen


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | | |
| 71/17 | 16/00297-2 | Dagføringar av Brandstøðini | 3 |
| 72/17 | 17/00234-1 | Eykajáttan 2017, Brandstøðin | 4 |
| 73/17 | 17/00107-2 | Dagføringar á lendingina í Nesi | 5 |
| 74/17 | 17/00148-2 | Bilar til húsatoymið/kommunuskrivstovuna | 7 |
| 75/17 | 17/00178-2 | BHS 2017 | 11 |
| 76/17 | 17/00210-2 | Skuld eldri enn 5 ár avskrivast | 12 |
| 77/17 | 17/00259-3 | Marknaumskipan millum matr. 107o og matr. 107g | 12 |
| 78/17 | 17/00271-2 | Yvonna Toftum o.fl. umsókn um sundurbýti av mart.nr. 259a | 13 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 79/17 | 17/00294-1 | Umsókn um leigu av matr. 114 | 14 |
| 80/17 | 17/00214-2 | Uppskot til reglugerð fyri flogfenaðhald. | 15 |
| 81/17 | 17/00157-2 | KT politikkur | 16 |
| 82/17 | 17/00266-2 | Samskiftisavtala við Føroya Tele | 16 |
| 83/17 | 17/00304-2 | Leigusáttmáli Marghøll, brúksrættur | 17 |
| 84/17 | 17/00291-3 | Umsókn um keyp av grundstykki matr. 490f og evt. 490k í Vági | 18 |
| **Til kunningar/umrøðu** | | | |
| 9/17 | 17/00008-5 | Kunning til Býráðsfundur mánadagin 28/8-17 - ætlan hjá Bakkafrost | 18 |
| 10/17 | 17/00008-6 | Re: russisk skip | **Fejl! Bogmærke er ikke defineret.** |
| | | | |

Erhard Joensen hevur boða frá, at hann ikki kundi møta til hendan fundin og hevur biði um at fáa varalim inn.

Býráðið atkvøddi um at Jens Sivar Djurhuus tekur sætið til hendan býráðsfundin. Einmælt samtykt.

# 71/17 Dagføringar av Brandstøðini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska- og umhvørvisnevndin | 15.05.2017 | 44/17 | 16/00297-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.05.2017 | 55/17 | 16/00297-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.06.2017 | 72/17 | 16/00297-2 |
| 4 Vágs Býráð | 26.06.2017 | 66/17 | 16/00297-2 |
| 5 Vágs Býráð | 28.08.2017 | 71/17 | 16/00297-2 |

Brandstøðin á Eiðisvegi 32 treingir til dagføringar.

TD mælir til at bygningurin verður isoleraður við steinull, og klæddur við imp. profil timbur brettum.

Kostnaðurin verður mettur til. (ex. máling)

- Tilfar: kr. 60.000,-
- Arb.løn: (3 mans. 4 vikur á kr. 330,-) kr. 158.000,-

**Tekniska- og umhvørvisnevndin 15. maj 2017:**
Samtykt er, at arbeiði verður gjørt eftir viðløgdu kostnaðarmeting. Málið verður beint í Fíggjarnevndina til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 22. maj 2017:**
Einmælt samtykt, at útseta málið.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2017:**
Einmælt samtykt, at játtað kr. 60.000 av innistandandi til tilfar at klæða bygningin við. Málið verður beint í Býráðið har tað skal hava 2 viðgerðir, tí talan er um eykajáttan.

**Vágs Býráð 26. juni 2017:**
Einmælt samtykt at taka undir við at játta 60.000 kr í eykajáttan til klædning til brandstøðina. Málið skal tvinnar avgerðir.

**Vágs Býráð 28. august 2017:**
Einmælt samtykt til seinnu viðgerð, at taka undir við eykajáttan.

# 72/17 Eykajáttan 2017, Brandstøðin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.06.2017 | 80/17 | 17/00234-1 |
| 2 Vágs Býráð | 26.06.2017 | 64/17 | 17/00234-1 |
| 3 Vágs Býráð | 28.08.2017 | 72/17 | 17/00234-1 |

Kirstin S Bech, býráðslimur, hevur heitt á umsitingina um at leggja hetta mál fyri Fíggjarnevndina. Guðmundur Jacobsen hevur tosað við Fíggjarleiðarin um roknskapartølini fyri 2016 og FÆ17. GJ hevur eisini sett upp tøl fyri hvat manglar og hvat kemur at mangla hjá Sløkkiliðnum í komandi árum, samlaður kostnaður fyri 12 "ting" er 2,3 mió kr.

GJ ynskti, at keyp av einum mannskapsbili var ásett í FÆ17, men hetta var ikki raðfest av Býráðnum í FÆ17-arbeiðnum.

Í fyrstu syftu ynskja KSB og GJ, at ein mannskapsbilur verður keyptur, har metti kostnaðurin er 320.000 kr. Umsitingin veit ikki hvat grannakommunurnar siga til hetta (tær hava neyvan sett pengar av á teirra FÆ17).

Neyðugt verður við eykajáttan til møguligt keyp. Um eykajáttan verður latin verður mælt til, at hon verður tikin av innistandandi. Málið skal síðani fyri Býráðið, og hava 2 viðgerðir har.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2017:**
Einmælt samtykt, at geva eykajáttan til Mannskapsbilin treyta av at grannakommunurnar eisini játtað sín part. Málið verður beint í Býráðið, tí hetta er eykjáttan av innistandandi.

**Vágs Býráð 26. juni 2017:**
Einmælt samtykt at taka við tilmælinum frá FN.  Málið skal hava tvinnar atgerðir.

**Vágs Býráð 28. august 2017:**
Einmælt samtykt til seinnu viðgerð, at taka undir við Fíggjarnevndini.

# 73/17 Dagføringar á lendingina í Nesi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havna- og Vinnunevndin | 15.05.2017 | 17/17 | 17/00107-2 |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 12.06.2017 | 22/17 | 17/00107-2 |
| 3 Tekniska- og umhvørvisnevndin | 13.06.2017 | 61/17 | 17/00107-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 19.06.2017 | 74/17 | 17/00107-2 |
| 5 Vágs Býráð | 26.06.2017 | 65/17 | 17/00107-2 |
| 6 Vágs Býráð | 28.08.2017 | 73/17 | 17/00107-2 |

Dia Poulsen hevur umvegis teldupost send til VK áheitan um, at vegurin oman til lendingina í Nesi er í ringum standi og treingir til at verða hampaður og dagførdur.

*"Aftan á eina brimódn á vetrinum 2013/14, sendi eg ein teldupost til Vágs kommunu, og segði frá at vegurin til lendingina á Nesi var skolaður burtur. Enn hevur ongin reaktión verði hesum viðvíkjandi, og leggjast kann afturat at stórur partur av vegnum er ikki koyrandi eftir við vanligum bili. Áður kom nakað av ferðafólki oman at nýta ta reinu strondina, hetta er hildi uppat. Sostatt verður sagt frá hesum. /vh. Dia Poulsen"*

TD hevur verði á staðnum og staðfest, at vegurin treingir til ábøtur. TD metur at kostnaðurin verður uml. kr. 60.000,- at hampa og dagføra vegin oman til lendingina á Nesi
Neyðugt er at grava og drena framvið vegnum, soleiðis at vatn setur burtur, eins og neyðugt verður at hampa um skráðar og leggja nakað av tilfari í holurnar í vegnum.

*Tekniska Deild 07.06.2017*:
Tekniski leiðarin og arbeiðsformaðurin hava verið á staðnum og mett um lendingina og vegin hvør sær. TD metur at bytislykilin millum veg og lending verður:

Vegur 60%, kr. 36.000,-
Lending 40%, kr. 24.000,-

TD leggur máli viðv. kostnaðinum av vegnum fyri TN til støðutakan.

**Havna- og Vinnunevndin 15. maj 2017:**
Jaligt at ábøtur verða gjørdar á veg og lending. Havnanevndin vil hava greiði á hvør hevur ábyrd av vegnum. Umsitingin kannar kostnað av vegi og bryggju hvør sær. Málið verður lagt fyri nevnd aftur á komandi fundi.

**Havna- og Vinnunevndin 12. juni 2017:**
Einmælt samtykt at Havnanevndin átekur sær kostnaðin at umvæla lendingina eftir tilmæli frá TD. Málið verður lagt fyri fíggjarnevndina við umbøn um eykajáttan.

**Tekniska- og umhvørvisnevndin 13. juni 2017:**
Einmælt samtykt, at TN átekur sær kostnaðin av umvæla vegin eftir tilmæli frá TD. Mælt verður til at arbeiði verður gjørt í samband við spillisvatnsætlanina á Nesi.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2017:**
Einmælt samtykt, at játtað 24.000 kr av innistandandi. Málið skal hava 2 viðgerðir í Býráðið.

**Vágs Býráð 26. juni 2017:**
Einmælt samtykt at lata eykajáttan á 24.000 kr til dagføring til lendingina á Nesið. Málið skal hava tvinnar atgerðir.

**Vágs Býráð 28. august 2017:**
Einmælt samtykt til seinnu viðgerð, at játta 24.000,00 kr. til dagføring av lendingini á Nesið.

# 74/17 Bilar til húsatoymið/kommunuskrivstovuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska- og umhvørvisnevndin | 15.05.2017 | 48/17 | 17/00148-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.05.2017 | 58/17 | 17/00148-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.06.2017 | 83/17 | 17/00148-2 |
| 4 Tekniska- og umhvørvisnevndin | 31.05.2017 | 54/17 | 17/00148-2 |
| 5 Tekniska- og umhvørvisnevndin | 13.06.2017 | 55/17 | 17/00148-2 |
| 6 Vágs Býráð | 26.06.2017 | 62/17 | 17/00148-2 |
| 7 Vágs Býráð | 28.08.2017 | 74/17 | 17/00148-2 |

Deildin hevur 8 bilar íalt (írokna 3 bilar hjá Brandstøðini), og miðalaldurin er 9 ár. (Tá síggja vit burtur frá gamla brandbilinum, ið hevur ein aldur uppá 40 ár.)

**Støðan d.d.**

- **Umsitingin**
  - VK keypti ein brúktan (Suzuki Grand Vitara) í 2015, ið var skrásettur fyrstu ferð í 2005. Hesin bilur hevur seinastu 4 vikurnar staði á verkstaði hjá Jón Nielsen í Hovi, orsakað av fleiri brekum. Men serliga av at hann ikki startar. Jón hevur roynt at umvælt bilin, og hann hevur útskift eykalutir, tó uttan úrslit. Ein møguleiki er at senda bilin til Havnar á verkstað, men hetta verður mett at verða kostnaðarmikið og ivasamt, við ætlið til aldur og virði á bilinum.
    - TD mælir ístaðin til, at ein nýggjur bilur verður keyptur til umsitingina í inniverandi ári.
      - Kostnaðurin (2017) uml. kr. 350.000,- ink.MVG
- Húsavøratoymið
  - Húsavørutoymið hevur bert ein bil, sum VK keypti brúktan í 2015. Bilurin er skrásettur fyrstu ferð í 2007, og sýnist at vera slitin og gamal. Men serliga trupult er at tað at røkja sjálvstøðugar uppgávur hjá húsavørðutoyminum, við bert einum bili.
    - TD mælir tí til, at húsavørutoymið varðveittur verandi bilin í uml. 1-2 ár, men at ein nýggjur bilur verður keyptur/leasing beinanvegin. Núverandi bilurin verur síðani útskiftur Í 2018, soleiðis verður verandi, tá 11 ára gamli Fordur útskiftur.
      - Kostnaðurin (2017) uml. kr. 200.000,- ink. MVG
      - Kostnaðurin (2018) uml. kr. 200.000,- Ink. MVG
- Vegatoymið
  - Her eru tveir bilar, har tann eini Renault Master, -sum Heri Silvurdal koyrir- bert er 1 ár, og harvið tíðarhóskandi og í góðum standi.
  - Næsti bilurin er ein Toyota Dyna við krana, sum Meinard Edmund koyrir. Hesin bilurin bleiv keyptur brúktur í 2012, og var skrásettur fyrstu ferð í 2007. Bilurin er gamal og slitin, serliga vánalig er støðan við krananum, ið mælt verður til ikki at brúka.
    - TD mælir til at ein nýggjur líknandi lastbilur við krana verður keyptur í 2018.
      - Kostnaðurin ókendur

TD metur ikki at tað er skilagott at keypa gamlar bilar. Tað sýnist sum, at gomlu bilanir krevja størri rakstarar útreiðslum enn vanta, eins og at hesir signalera vánaligt image.

Ístaðin mælt TD til at VK útskiftur ein av gomlu bilinum hvørt ár í komandi 5 árini, soleiðis at ongin bilur gerst eldi enn 5-7 ár.

Ongir játtan er í inniverandi ári til keyp av bilum, neyðugt er tí at søkja um eykajáttan.

***Tekniska Deild 9. mai. 2017***

Remus á Borg er komin við fyrispurningi um at keypa Suzuki.

**Tekniska- og umhvørvisnevndin 15. maj 2017:**

Einmælt samtykt er at keypa ein bil til Teknisku Deild. Tekniska Nevnd biður um eina eykajáttan á 210.000 kr. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. maj 2017:**

Einmælt samtykt, at málið verður útsett.

***Tekniska Deild 30. mai. 2017***

Áheitan er komin til Tekniskudeild um at innheinta tilboð uppá leasing av tveimum bilum.

# Tað er bert -Reyni Service- í Fø, sum leasar bilar, og tilboðs prísurin er:

| Bilur | Proace Medium 2,0D Comfort, einkult skjótihurð | Verso 1.8 bensin T2 Premium | Rav4 2.5 Hybrid 4X4 H3 | Hilux persónbilur 2.4 D 4X4 T2 |
|---|---|---|---|---|
| Stovningargjald | 24.000,- | 24.000,- | 24.000,- | 24.000,- |
| Mánaðargjald | 4.368,- | 4.296,- | 5.552,- | 6.840,- |
| Leveringstíð | Á goymslu (hvítt) | Á goymslu (Bronsa) | Á goymslu (Svart, grátt og hvítt) | 5 mánar |

Prísinir eru uttan mvg. Íroknað prísinum er alt viðlíkahald, eisini dekk og dekkskift, virðistap, vektgjald og trygging.

***Tekniska Deild 2 juni.2017:***

Tekniska Deild hevur tørvsmett støðuna, og mælir til, at í inniverandi ári verða 2 bilar útvegaði, ein til húsatoymið og ein til umsitingina.

**Bilur til húsatoymið:**

- Tørvur er á einum innilokaðan vørubil, sum kann flyta hampuliga stórt byggitilfar og amboð. TD mælir til at taka av tilboðnum frá Reyni Service uppá ein Proace, sí niðanfyri.

| Bilur | Proace Medium 2,0D Comfort, einkult skjótihurð |
|---|---|
| Stovningargjald | 24.000,- |

| | |
|---|---|
| Mánaðargjald | 4.368,- |
| Leveringstíð | Á goymslu (hvítt) |

**Bilur til umsitingina:**

- Umsitingin hevur seinastu árini havt ein Suzuki Grand Vitara, ið trekkir á øllum 4 hjólum, og sum m.a. hevur verði nýttur til røkt av høgt liggjandi vatn reinsuverkinum og brunnum. Hesin Suzuki er óvirkin, og mælt verður frá at umvæla hann orsakað av sliti og aldri. TD metur at tørvur er á einum slíkum bili, sum trygt kann flyta starvsfólk til at røkja hesi støð alt ári. TD mælir til at taka av tilboðnum frá Reyni Service uppá ein Rav4, sí niðanfyri.

| | |
|---|---|
| Bilur | Rav4 2.5 Hybrid 4X4 H3 |
| Stovningargjald | 24.000,- |
| Mánaðargjald | 5.552,- |
| Leveringstíð | Á goymslu (Svart, grátt og hvítt) |

**Tekniska- og umhvørvisnevndin 31. maj 2017:**
Málið verður beint til fyrstkomandi fund í TN.

**Tekniska- og umhvørvisnevndin 13. juni 2017:**
Einmælt samtykt at kommunan leasar ein Proace Medium til húsatoymið og Rav 4x4 hybrid til umsitingina. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2017:**
Einmælt samtykt, at taka undir við Teknisku Nevnd. Eisini at Suzuki verður seldur skjótast gjørligt.

***Umsitingin 23 juni 2017 :***
Eykajáttan á 410.000 kr. má latast av innistandandi. Upphæddin er roknað út frá, at 2 bilar verða leasaðir í 36 mðr. Hetta skal hava 2 viðgerðir í Býráðnum.

**Vágs Býráð 26. juni 2017:**
Einmælt samtykt at taka undir við TN og FN og leasa ein Proace Medium til húsatoymið og Rav 4x4 hybrid til umsitingina.

***Umsitingin 25 august 2017/PT:***
Toyota Proace Medium er leasaður í 60 mðr, kostnaður av hesum er kr. 348.000. Sostatt má eykajáttanin til 2 bilar verða væl hægri enn kr. 410.000 ella má leasing tíðarskeiðið styttast munandi. Vit hava kontakta Reyni Service um hetta, men hava ikki fingið endaligt svar enn.

***<u>TD 25 august2017:</u>***
Reyni Service veitir leasing avtalur uppá annahvørt 36 mnd. ella 60 mnd. Og tá leasingsáttmálin fyri MV474 Proace er sendur VK í juni mnd. 2017, stendur í hesum, at sáttmálin er galdani í 60 mnd. Hetta vísir seg at viðføra, at uppruna eykajáttanin kemur ikki at halda. Tí hevur TD -eftir ynskið frá FD- nú vent seg til Reyni Service við fyrisp. um at stytta um leasingtíðina uppá MV474 frá 60 mnd. til ístaðin ein leasing sáttmála galdandi yvir 36 mnd. Hetta hevur Reyni Service játta og hava 25.08.2017 sent Vágs Kommunu ein nýggjan leasingsáttmála, sum er eins og tann fyrri, tó bert við undantakinum, at sátmálin nú er galdandi í 36 mnd.
Sostatt er ikki neyðugt at broyta uppá eykajáttanina, men bert undir skriva nýggja leasing sáttmálan fyri MV474 uppá 36 mnd.

**Vágs Býráð 28. august 2017:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum, kostnaðurin verður áleið 460.000,00 kr. yvir 3 ár.

## 75/17 BHS 2017

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Sosiala- og heilsunevndin | 17.05.2017 | 14/17 | 17/00178-2 |
| 2 Vágs Býráð | 06.06.2017 | 46/17 | 17/00178-2 |
| 3 Vágs Býráð | 28.08.2017 | 75/17 | 17/00178-2 |

Umsitingin mælir til, at samsvar fæst millum FÆ2017 hjá VK og BHS skjótast gjørligt. Sum nú er kemur VK at betala uml 1 mió meir í rakstrarútreiðslum til BHS, og VK fær onga leiguinntøkur (2,45 mió). Sostatt er munurin millum báðar fíggjarætlanirnar uml 3,5 mió, ið "vendir skeivan" veg fyri VK.

VK má játtað 3,53 mió av innistandandi í eykajáttan ella má BHS fáa boð um at spara.

**Sosiala- og heilsunevndin 17. maj 2017:**
Einmælt samtykt at heita á umboðini hjá Vágs kommunu í stýrinum fyri Suðuroyar Bú- og heimatænastu um, at kunnað býráðið á komandi fundi um støðuna og hvar málið liggur. Og nær vantast kann at hetta kann verða avgreitt.
Um eingi útlit eri fyri loys má annað stig takast.

**Vágs Býráð 06. juni 2017:**
Borgarstjórin kunnur um at fundur verður í stýrinum í morgin 7/6-2017 og umboðini fyri Vágs kommunu hava biði um at fáa hetta á skrá.

***Umsitingin 10 juli 2017:***
Skjøl eru komin okkum í hendi fyrst í juli, sum vísa, at leiguinntøkurnar helst bara verða helvtina av avsettu upphæddini, og tí mugu inntøkurnar lækkast við kr. 1.228.000 í FÆ17. Samstundis vísa onnur skjøl, at rakstrargjaldið má hækkast við kr. 1.255.000 í FÆ17. Hetta ávirkar VK negativt við kr. 2.483.000, ið má játtast av innistandandi.

**Umsitingin 24 august 2017 :**
VK hevur í 2 umførum sent krøv umvegis KMR um leigu fyri 2017 til BHS, men enn eru ongir pengar komnir. Umsitingin metir tað sum ósannlíkt, at BHS vil betala leigu fyri Hamragarð og Eldrasambýlið í 2017.

**Vágs Býráð 28. august 2017:**
Borgarstjórin kunnar um málið, formaðurin í Suðuroyar Bú- og Heimatænastu hevur játta at kalla inn til fundar í komandi viku fyri at royna at loysa málið.
Serliga ognarviðurskiftini hevur stóran týdning at fáa uppá pláss nú, økið hevur virka úti hjá kommununum síðan 1. januar 2015, í skjótt 3 ár.

## 76/17 Skuld eldri enn 5 ár avskrivast

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.08.2017 | 109/17 | 17/00210-2 |
| 2 Vágs Býráð | 28.08.2017 | 76/17 | 17/00210-2 |

Talan er um 34 skuldarar á íalt kr 18.745,33 har skuldin er eldri enn 1/1-2013. Skuldin stavar frá barnaansing og Vágs Havn (serliga leiga fyri neystagrundir).

Avsett er móti øllum hesum. Bókhaldið hevur sent nógvar rykkjarar í fleiri ár. Størsti skuldarin er fluttur til DK, og tey hava ikki svara uppá okkara rykkjarar í áravís.

Mælt verður til, at alt hetta verður avskriva.

**Fíggjarnevndin 22. august 2017:**
Einmælt samtykt at taka undir við at avskriva hetta.

**Vágs Býráð 28. august 2017:**
Einmælt samtykt at avskriva hetta.

## 77/17 Marknaumskipan millum matr. 107o og matr. 107g

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska- og umhvørvisnevndin | 15.08.2017 | 73/17 | 17/00259-3 |
| 2 Vágs Býráð | 28.08.2017 | 77/17 | 17/00259-3 |

Eivind hevur 30.06.2017 latið inn umsókn um marknaumskipan millum sína ogn á matr 107o og ognina hjá Sannu Jacobsen á matr. 107g, so matrikullinjan fylgir garðinum millum húsini.

**Tekniska- og umhvørvisnevndin  15. august 2017:**
Einmælt samtykt at loyva marknaumskipan millum matr. 107o og matr. 107g. Málið verður beint í býráðið.

**Vágs Býráð 28. august 2017:**
Einmælt samtykt at taka undir við Teknisku- og umhvørvisnevndini.

## 78/17 Yvonna Toftum o.fl. umsókn um sundurbýti av mart.nr. 259a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska- og umhvørvisnevndin | 15.08.2017 | 66/17 | 17/00271-2 |
| 2 Vágs Býráð | 28.08.2017 | 78/17 | 17/00271-2 |

Vágs Kommuna hevur móttikið hin 18.07.2017 umsókn um sundurbýti av matr.nr. 259a frá Yvonnu Toftum, Eirikur Magnussen og Suna Magnussen.

Talan er um eina trøð uppá 4110m2 í vídd, ið liggur í Bústaðarøki A&B, sum eigarin ynskir at sundurbýta í 3 lutir, samb. viðheftu tekning.

1. Norðasti parturin niðan ímóti Geilini, við ástandandi sethúsunum hjá Suna Magnussen, Geilin 83 ynskist sundurbýtt við einari stødd áleið 800m2.
2. Sunnasti parturin oman ímóti Fossavegi, við ástandi sethúsum Fossavegur 28, ynskist sundurbýttir við einari stødd áleið 1000m2.
3. Ein geil uppá 3 metrar í breidd (eystur og vestur) ynskist millum grannastykkið P/F Telefonverkið, til atkomuveg millum Fossaveg og miðøkið.

TD mælir til, at atlit verður tikið til planlagda vegin (matr.nr. 256b), ið er hugsaður at gerast millum Høgabø og Skálabeitið, soleiðis at hesin eisini verður áteknaður á matr.nr. 259a.

**Tekniska- og umhvørvisnevndin 15. august 2017:**
Einmælt samtykt at loyva sundyrbýti av matr. 259a. Málið verður beint í Vágs Býráð.

**Vágs Býráð 28. august 2017:**
Einmælt samtykt at taka undir við Teknisku- og umhvørvisnevndini.

# 79/17 Umsókn um leigu av matr. 114

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havna- og Vinnunevndin | 14.08.2017 | 28/17 | 17/00294-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.08.2017 | 101/17 | 17/00294-1 |
| 3 Vágs Býráð | 28.08.2017 | 79/17 | 17/00294-1 |

Hans Jákup Debess hevur 10.aug. 2017 vent sær til kommunuskrivstovuna við atliti at leiga part av lendi niðan til parkeringsplássi á matr 114. Støddin á umbidna økinum er ca. 1500 m2. Økið skal nýtast til seyðahald. Tað hevur áður verið leiga út til flogfenaðhald.




**Havna- og Vinnunevndin 14. august 2017:**
Einmælt samtykt at leiga Hans Jákup Debess part av matr. 114.

**Fíggjarnevndin 22. august 2017:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum og beina málið í býráðið.

**Vágs Býráð 28. august 2017:**
Einmælt samtykt at útseta málið.
Vágs kommuna og Landsverk arbeiða við einari ferðslutrygdarætlan fyri Vágs kommuna og kann tað verða neyðugt at nýta partar av hesum økið, fundur verður við LV í september.

# 80/17 Uppskot til reglugerð fyri flogfenaðhald.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska- og umhvørvisnevndin | 13.06.2017 | 60/17 | 17/00214-2 |
| 2 Vágs Býráð | 26.06.2017 | 60/17 | 17/00214-2 |
| 3 Tekniska- og umhvørvisnevndin | 15.08.2017 | 69/17 | 17/00214-2 |
| 4 Vágs Býráð | 28.08.2017 | 80/17 | 17/00214-2 |

Tá tað er fleiri húsarhald, ið fáa sær flogfenað í bygdum øki, og tað er flogfenaður, ið er til ampa fyri grannar, er tørvur á einari reglugerð, ið vil betra um viðurskifti hesum viðvíkjandi.

Tað eru longu kommunur, ið hava reglugerð fyri flogfenaðhald, og við tí økta áhuganum fyri flogfenaðhald kann hugsast at enn fleiri kommunur koma at viðtaka eina reglugerð.

**Tekniska- og umhvørvisnevndin 13. juni 2017:**
Einmælt samtykt at seta reglugerð fyri flogfenaðhald í Vágs Kommunu. Málið verður beint í býráðið.

**Vágs Býráð 26. juni 2017:**
Einmælt samtykt at taka undir við reglugerðini fyri flogfenaðhald í Vágs Kommunu og seta hana í gildið, tá heilsufrøðiliga starvsstovan hevur góðtikið hana. Tekniska Deild skal umsita hesa reglugerð og syrgja fyri at hon verður eftirfylgd.

**10.08.2017 Tekniska Deild**
Tekniska Deild hevur móttikið viðmerkingar frá Umhvørvisstovuni, har tey viðmæla ymiskar brotyingar til reglugerðina. Sí viðmerkingar til uppskot um reglugerð um flogfenaðhald frá Umhvørvisstovuni.

**Tekniska- og umhvørvisnevndin 15. august 2017:**
Einmælt samtykt at seta reglugerð fyri flogfenaðhald í gildi við teimum seinastu broytinginunum í reglugerðini.

**Vágs Býráð 28. august 2017:**
Einmælt samtykt at taka undir við Teknisku- og umhvørvisnevndini.

## 81/17 KT politikkur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.08.2017 | 107/17 | 17/00157-2 |
| 2 Vágs Býráð | 28.08.2017 | 81/17 | 17/00157-2 |

Verður lagdur fyri Fíggjarnevndina. Tá FN hevur samtykt skal hann beinast í Býráðið. Seinast dagførdur í apríl 2013.

**Fíggjarnevndin 22. august 2017:**
Einmælt samtykt at leggja hetta fyri býráðið.

**Vágs Býráð 28. august 2017:**
Samtykt at útseta málið til næsta fund.

## 82/17 Samskiftisavtala við Føroya Tele

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.08.2017 | 102/17 | 17/00266-2 |
| 2 Vágs Býráð | 28.08.2017 | 82/17 | 17/00266-2 |

Núverandi avtala við FT gongur út 31.10.2017.
Telefonparturin kostaði uml 138.000 kr u/mvg í 2016 (11.500 í miðal). Jan – Mei 2017 hevur kosta uml kr 10.500 u/mvg í miðal. Internet parturin kostar uml 8.100 pr mðr í 2017.

Hetta er lutfallsliga lítil kostnaður av samlaða rakstrinum hjá VK, og mælir umsitingin tí til, at leingja samstarvi við FT í 3 ár uttan at bjóðað hetta út.

**Fíggjarnevndin 22. august 2017:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

**Vágs Býráð 28. august 2017:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

# 83/17 Leigusáttmáli Marghøll, brúksrættur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.08.2017 | 113/17 | 17/00304-2 |
| 2 Vágs Býráð | 28.08.2017 | 83/17 | 17/00304-2 |

Leigusáttmálin er grundaður á núverandi leigusáttmála við Páls Høll. Løgfrøðingurin hjá Kommunufelagnum hevur eisini havt hann til umrøðu/rættlestur. Lánveitarin hevur nakrar strangari treytir enn viðv. Páls Høll.

Í máli 17/00104 hava 5 Býráðslimir undirskrivað, at Vk skal leiga Marghøllina fyri 1 mió. kr. um árið o.a.

Mælt verður til í §3, at gjalding ikki byrjar fyrr enn høllin er liðug.

Umsitingin hevur móttikið sáttmálan tíðliga 21/8-17 (eftir vanliga freist).

**Fíggjarnevndin 22. august 2017:**
Einmælt samtykt at leggja fyriliggjandi fyri Býráðið.

**Vágs Býráð 28. august 2017:**
Samtykt við 6 atkvøðum fyri. Jens Sivar Djurhuus, Conrad G. Joensen og Levi Mørk atkvøddi ímóti.

## 84/17 Umsókn um keyp av grundstykki matr. 490f og evt. 490k í Vági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska- og umhvørvisnevndin | 15.08.2017 | 68/17 | 17/00291-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.08.2017 | 99/17 | 17/00291-3 |
| 3 Vágs Býráð | 28.08.2017 | 84/17 | 17/00291-3 |

Hjalmar Sjóvará hevur, vegna Eigarafelagið Smátturnar í Vági, sent teldupost um keyp av grundstykki á matr. 490f og matr. 490k, ið hvørt eru 731 til støddar.

Tann 17.04,2017 samtykti Vágs Býráð, at grundstykkini á Gjógvarabøi skuldu seljast fyri kr. 50.000, men býráðið hevur ikki tikið støðu til stykkini í Mýrunum. Grundin at lækka prísin var at fáa fólk at búseta seg í Vági, og ikki til ferðavinnuendamál.

Vágs Kommuna hevur fyri stuttum keypt grundstykki á 490k frá fyrrverandi eigara aftur fyri 100.000 kr., tí tað er vanligt, at kommunan keypir aftur fyri somu upphædd, ið grundstykkið verður selt fyri.

Sambært kunngerð nr. 122 frá 22. Desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn skal fastogn hjá kommununi verða boðin út alment, áðrenn ognin verður seld.

**Tekniska- og umhvørvisnevndin 15. august 2017:**
Einmælt samtykt ikki at selja grundstykkini fyri 50.000 kr. TN tilmælir at prísurin fyri grundstykkini verður 100.000 kr. Málið verður beint til Vágs Býráð.

**Fíggjarnevndin 22. august 2017:**
Einmælt samtykt at taka undir við Teknisku- og umhvørvisnevndini. Málið verður beint til býráðið. Heitt verður á felagið um at koma inn á býráðsfundin at kunnað um ætlanina.

**Vágs Býráð 28. august 2017:**
Einmælt samtykt at taka undir við Teknisku- og umhvørvisnevndini.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Dennis Holm | Eydis Kjærbo | Kirstin Strøm Bech |
| Levi Mørk | Anna Brattaberg Samuelsen | Eyðbritt Krosslá |
| Dánjal Bjarkhamar | Conrad Gaard Joensen | Jens Sivar Djurhuus |